# Kvinnulist úr Norður Atlantshavið



*86 listafólk sýndu sína list fram í stóra Ráðhússalinum*



*Sigrun Gunnarsdóttir samskipaði føroyska partin av framsýningini og vísti sjálv sínar sterku andaligu málningar fram*



*Høgni Hoydal føroyskur limur í Norður Atlantsbólkinum á Fólkatingi royndi sermerktu listainstallatiónina*

**Kvinnurnar eru í stórum meiriluta á stóru Norður Atlantsframsýningini í Ráðhúsinum í Keypmannahavn, ið lat upp fríggjadagin**

LISTAFRAMSÝNING

*Orð: Niels Uni Dam*
*myndir: Símun Jóannesarson*

Fríggjadagin læt listaframsýning við 20 føroyskum, 62 íslendskum og 4 grønlendskum listafólkum upp í Ráðhúsinum í Keypmannahavn. Stóri Ráðhússalurin var á tremur við listaverkum úr Norðuratlantshavi.

## Væl vitja fernisering

Nógv av listafólkunum og hópin av listaáhugaðum vóru savnaði, tá listaframsýningin læt upp. Mentanarborgarstjórin í Keypmannahavn bjóðaði vælkomnum og segði seg gleðast almikið um at fáa vitjan av trimum bróðurtjóðum úr Norður Atlantshavi. Hann hugleiddi um stóra tilknýtið millum Keypmannahavn og føroysk, íslendska og grønlendska fólki.

Um Bryggjuna, ið hevði verið lívlinjan norðureftir, og sum aftur í okkara, var vorðin ein miðdepil fyri sambandi við hesi lond, nú á mentanarliga økinum. Hann gleddist eisini um alla listina, ið soleiðis pyntaðu Ráðhússalin og Ráðhúsini, ið sjálvi vóru eitt listaverk. Geertsen helt, at samanumtikið spældi náttúran ein stóran leiklut í hesum listaverkum, og at tað hann kendi til Norður Atlantslist, so var hetta eisini eyðkenni við henni.

## Keypur bankar meðan konan skapar list

Borgarstjórin í Reykjavík Steinunn Valdís Óskarsdóttir helt síðan røðu. Hon frøddist um, at Keypmannahavn soleiðis hevði latið dyrnar upp fyri hesi stóru framsýning. Hon helt tað vera merkisvert, at kynsbýtið millum íslendsku listafólkini var sum tað var, við 58 kvinnum og 4 monnum. Hetta hóast talan var um úrvalsframsýning, ið danin Ole Kofoed og listafeløgini í norðurlendsku londunum høvdu valt út. Hon segði, at man fór at hugsa um, hvat íslendsku menninir gjørdu, meðan konurnar skaptu list. Men teir vóru ivaleyst runt í Keypmannahavn og keyptu bankar, handlar og aðrar fyritøkur

Aftan á at eitt umboð fyri íslendska mentamálaráðið hevði sagt nøkur orð, kom stigtakarin til framsýningina Ole Kofoed á talarastólin. Hann greiddi frá, at hetta hevði verið sera spennandi men tíðarkrevjandi arbeiði at skipa fyri hesi framsýning. Men við góðari hjálp frá samskiparunum í Íslandi og Føroyum var tað eydnast at skipa fyri størstu listaframsýning í Ráðhúsinum í Keypmannahavn nakrantíð. Framsýning hevur ikki færri enn 86 listafólk, ið sýna fram ymiskt innan myndlist, prýðislutir,